# Fogh dagførir felagsskapin

**Danski forsætisráðharrin vil lata føroyingar sjálvar gera av, hvussu og nær teir vilja fremja yvirøkur. Hann kallar tað eina modernisering av ríkisfelagsskapinum**

YVIRTØKUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*



– Hetta er tann støra broytingin í forholdinum millum Føroyar og Danmark, síðani heimastýrislógin kom í gildi.

Tað segði Anders Fogh Rasmussen, eftir at hann hevði skrivað undir eina yvirlýsing um at leggja uppskot fyri løgtingið og fólkatingið at seta yvirtøkulóg í gildi.

– Yvirlýsingin er ein nútímansgerð og menning av ríkisfelagsskapinum. Hetta er eitt stórt fet fram, og avtalan undirstrikar, at í einum modernaðum ríkisfelagsskapi eru tað føroyingar sjálvir sum gera av í hvønn mun, teir vilja yvirtaka málsøki, segði danski forsætisráðharrin.

Hann hevur síðani fyrstu dagarnar sum forsætisráðharri roynt at havt eitt betri samband við føroyskar myndugleikar, enn undanmaðurin Poul Nyrup Rasmussen megnaði. Og nýggja yvirtøkulógin, sum ynskjum hjá landsins leiðslu á møti, er enn eitt dømi um hetta.

### Avgerðin í Føroyum

Hvørki Anders Fogh Rasmussen ella Jóannes Eidesgaard vóru varnir við sínum orðum, tí teir løgdu báðir upp til, at yvirtøkulógin er ein stórhending í sambandinum millum Føroyar og Danmark.

– Føroyingar eiga nú avgerðina. Eg havi altíð tikið undir við, at framtíðin hjá føroyingum verður avgjørd av føroyingum sjálvum, og tað er nú gjørligt, segði Anders Fogh Rasmussen.

Jóannes Eidesgaard rósti danska forsætisráðharranum fyri sín Føroyapolitikk, sum løgmaður helt verða meira konstruktivan enn hjá undanfarnum donsku forsætisráðharrum.

# Sambandið fegnast um avtalu við danir

**– Um yvirtøkur eru ein fyrimunur fyri føroyska fólkið, so er Sambandsflokkurin sinnaður at verða við. Vit siga ikki nei bara fyri at siga nei, sigur Kaj Leo Johannesen, formaður í Sambandsflokkinum, sum fegnast um, at ein nýggj avtala er gjørd við danir**

YVIRTØKUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*



*– Um Sambandsflokkurin metir, at tað tænir Føroya fólki, og tað er fíggjarliga forsvarligt at gera eina yvirtøku, so er Sambandsflokkurin sinnaður at verða við í yvirtøkum, sigur Kaj Leo Johannesen, formaður í Sambandsflokkinum*

So hendi tað, sum tókist verða ómøguligt. Bæði Sambandsflokkurin og Tjóðveldisflokkurin fegnast um eina nýggja avtalu millum føroyingar og danir um yvirtøkur.

Í blaðnum í gjár segði Høgni Hoydal, formaður í Tjóðveldisflokkinum, at nýggja yvirtøkulógin kann gerast ótrúliga áhugaverd. Og í dag sigur Kaj Leo Johannesen, formaður í Sambandsflokkinum, at avtalan við danir er sera positiv fyri føroyingar.

– Hetta verður ein modernisering av heimastýrisskipanini, og tað er nakað, sum flokkarnir í samgonguni avtalaðu í samgonguskjalinum. Enn er ikki eitt komma broytt, men tá ið yvirtøkulógin verður løgd fyri løgtingið á ólavsøku, hava vit sett nakað á sporið, og so kunnu vit fara veruliga til arbeiðis, sigur Kaj Leo Johannesen.

– Hetta er sera positivt fyri føroyingar, og tað er Føroya fólk, sum eigur æruna fyri hesa avtaluna – ikki nakar ávísur politiskur flokkur ella persónur.

### Vilja fremja yvirtøkur

Sambandsflokkurin hevur verið tann mest sambandssinnaði flokkurin í føroyskum politikki, men nú er flokkurin við til at gera ein nýggja lóg, sum skal gera tað lættari hjá føroyingum at fremja yvirtøkur heilt fram at fullveldinum.

– Grundsjónarmiðið hjá Sambandsflokkinum er, at vit vilja fremja tann politikk, sum tænir Føroya fólki best. Eru tað fyrimunir við at yvirtaka eitt málsøki, so eru vit sinnaðir at verða við í tí. Vit siga ikki nei bara fyri at siga nei, og vit siga heldur ikki ja bara fyri at siga ja, sigur Kaj Leo Johannesen.

– Tíðirnar broytast so skjótt, og vit mugu hyggja eftir, hvat nútíðin og framtíðin hevur at bjóða. Sambandsflokkurin hevur kanska verið í so konservativur, men vit skulu eisini flyta okkum.

Vil tað siga, at tit eru sinnaðir at gera ítøkligar yvirtøkur, tá ið nýggja yvirtøkulógin er samtykt?

– Um Sambandsflokkurin metir, at tað tænir Føroya fólki, og tað er fíggjarliga forsvarligt at gera eina yvirtøku, so er Sambandsflokkurin sinnaður at verða við í yvirtøkum.

### Hugsar meira um onnur mál

Kaj Leo Johannesen heldur, at ein av størstu fyrimununum við nýggju yvirtøkulógini er, at fullveldismálið verður avgreitt, og politikararnir kunnu fara at arbeiða við at loysa aðrar stórar trupulleikar í samfelagnum.

– Vit missa arbeiðspláss hvønn einasta dag, og tað gera vit millum annað tí, at politikararnir ikki hava verið nóg góðir til at gera nakað við teir veruligu trupulleikarnar í samfelagnum. Fullveldislandsstýrið brúkti alla sína orku til fullveldismálið, og tí vóru onnur týðandi mál gloymd.

– Nú hava vit fingið eina avtalu við danir, sum øll kunnu liva við, og nú skulu vit til arbeiðis fyri at tetta skrokkin. Frameftir kunnu vit brúka okkara framrættaðu orku til at gera nakað við trupulleikarnar, sum eru í okkara samfelag, og skapa umstøður fyri fleiri arbeiðsplássum her á landi, sigur Kaj Leo Johannesen.

## Felags yvirlýsing

Við støði í núverandi stjórnarskipanarligu støðu Føroya og samsvarandi sjálvsavgerðarrætti Føroya fólks sambært altjóðarætti eru Føroya løgmaður og Danmarkar forsætisráðharri samdir um:

• At virka fyri at fremja skipan, har føroyskir myndugleikar kunnu taka við ábyrgdini av øllum málum og málsøkjum, undantikið ríkisstjórnarskipan, ríkisborgararættur, Hægstirættur, uttanríkis-, trygdar- og verjupolitikkur umframt gjaldoyra- og peningapolitikkur. Skipanin hevur sostatt við sær, at málsøki o.a. kunnu verða yvirtikin í størri mun enn sambært heimastýrislógini frá 1948,

• At einstøku yvirtøkurnar verða framdar sambært føroyskari avgerð og á ein slíkan hátt, at føroyskir myndugleikar samstundis taka við útreiðslum, ið eru tengdar at málsøkjunum, og føstum ognum, sum eru beinleiðis knýttar afturat teimum,

• At tryggja setanarviðurskifti hjá avvarðandi starvsfólkum sum liður í skipanini viðvíkjandi framtíðar yvirtøkum,

• At virka fyri, at skipanin viðvíkjandi at taka yvir málsøki verður framd við gildi frá 29. juli 2005,

• At halda fram við samráðingunum um skipan, har Føroya landsstýri kann gera ávísar altjóðarættarligar sáttmálar.

***

Føroya løgmaður og Danmarkar forsætisráðharri eru harumframt samdir um:

• At virka fyri, at rakstur og ogn hjá dønum í Vága Floghavn verður flutt føroyskum myndugleikum. Samstundis verður neyðugur peningur at fíggja dagføringina av floghavnini fingin til vega á tann hátt, at eginpeningurin í Íleggingargrunninum fyri Føroyar verður niðurkapitaliseraður samsvarandi. Semja er um at seta ein føroyskan-danskan serfrøðingabólk at áseta tøkniliga og búskaparliga gundarlagið. Á hesum grundarlagi boðar landsstyrið frá áhuga sínum, at verkætlanin verður framd.

**Í Keypmannahavn hin 4. apríl 2005**
*Jóannes Eidesgaard, Føroya løgmaður*
*Anders Fogh Rasmussen, Danmarkar forsætisráðharri*